# Kristi himmalferðardagur 9. mai

**SVF**

14.00 Halgimyndir
- finsk sending
14.30 Andre
- familjufilmur um ein kóp
16.00 Møti í Hoyvíkar skúla
17.05 Trúgv: Fólkakirkjan og fundamentalistar
17.35 Við tonnum, nevi og klón
- avstralsk náttúrusending
18.30 Pocahontas 13:26
18.55 Orðblind - donsk sending
19.25 Myndlist í Føroyum 11 e
19.50 Andakt
20.00 Av náði - sangløta við Ebenezerkórinum
20.40 Úr Kap til Kilimanjaro
21.10 Krimitímin: Íshúsið 2:3
22.05 White Man's Burden - amerikanskur filmur - Óhóskandi fyri smábørn
23.30 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Golf - U.S. P.G.A. Tour Compaq Classic New Orleans United States
8.30 Sailing
- Volvo Ocean Race
9.00 Motorsports - Series
9.30 Football
- Gillette Dream Team
10.00 Football
- World Cup Classics
11.00 Football
- World Cup Classics
12.15 Football
- Youth Festival Toulon
13.15 Football
- Youth Festival Toulon
15.00 Football - World Cup Legends Sweden
16.00 Football - Kick in Action Special South America
16.30 Football
- Gillette Dream Team
17.00 Football - Youth Festival Toulon - Live
18.45 Football
- Asian Culture Cup
19.00 Football - Youth Festival Toulon - Live
20.45 Boxing - To be announced
22.00 News
- Eurosportnews Report
22.15 Football
- World Cup Stories
22.30 Formula 1
- Inside Formula
23.00 Football
- Youth Festival Toulon
0.15 News
- Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 TLZ: »Journeys To The Bottom of The Sea - Blackbeard's Revenge«
1.00 TLZ: »Supervolcanos - Horizon«
2.00 TLZ: »The Mother of All Collisions«
2.30 TLZ: »What have the '60s ever done for us?«
2.40 TLZ: »Cyberart«
2.45 TLZ: »Lab Detectives«
3.00 TLZ: »Maiden Flights«
3.30 TLZ: »A Thread of Quicksilver«
4.00 TLZ: »Blood On The Carpet - The Rocco Forte Story«
4.40 TLZ: »Science in Action - Energy«
5.00 TLZ: »The French Experience - Argent«
5.15 TLZ: »The French Experience - Environments«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 The Story Makers
6.15 Step Inside
6.25 Angelmouse
6.30 Joshua Jones: »Plum Crazy«
6.40 Playdays: »Dot Stop«
7.00 Trading Places
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 Wild And Dangerous: »Lion Country«
9.45 Vets in Practice: »Eaten Alive«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Dragonfire«
11.30 Home Front in the Garden: »Shark«
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »The Body in the Library« - Part Three
13.30 Ready Steady Cook
14.15 The Story Makers
14.30 Step Inside
14.40 Angelmouse
14.45 Joshua Jones: »Plum Crazy«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »The Prodigal Returns«
16.45 Friends for Dinner: »Raymond Blanc«
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Health Farm
19.00 Eastenders
19.30 My Hero: »Pregnant«
20.00 The Ice House
21.00 Bottom: »Smells«
21.30 Nurse
22.20 The Big Trip
22.45 Holiday Snaps: »Worcestershire - France - Leeds«
23.00 Casualty

**BBC WORLD**

0.00 BBC News - followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News - followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News - followed by Weather
2.30 Europe Direct (r)
3.00 BBC News - followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News - followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News - followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News - followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News - followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News - followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News - followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News - followed by Weather
10.30 Europe Direct (r)
11.00 BBC News - followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 World Business Report
12.00 BBC News - followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News - followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News - followed by Weather
14.30 The Car's The Star (r)
15.00 BBC News - followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News - followed by Weather
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report - followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News - followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News - followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News - followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News - followed by Weather
22.30 Panorama
23.00 BBC News - followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV 3**

5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 Havets hemmeligheder
8.00 En verdensomsejling under havet
10.30 Navarones kanoner
13.30 DONG Cup
16.30 Løvernes Konge - Flemming Østergaard
17.30 Løvernes Konge - Flemming Østergaard
18.30 The Ellen Show
19.00 Bag Facaden
20.05 Rob Roy
22.45 Seinfeld
23.15 Simpsons
23.45 Ti tommelfingre
0.15 Walker Texas Ranger
1.10 Træneren
1.40 Træneren
2.10 Ti tommelfingre
2.35 Sunset Beach
3.20 Godnat

**ÚF**

10.00 Tíðindi
10.05 Barnaløtan - Jonna og Kári leggja til rættis
10.30 Prísið Guði í himnahøllum - Himmalsferðaroratoriið hjá Johann Sebastian Bach - Janus Mohr leggur til rættis
11.00 Guðstænasta í Rituvíkar kirkju - Meinhard Bjartalíð, prestur, prædikar
12.10 Grammofonkonsert
12.40 Døgurðatónar
13.10 Ein ónyttug stjørna
- Stuttsøga eftir Hanus Kamban. Ria Tórgarð lesur
13.40 Við æru eftir vælgjørt verk
- Tónlist við hátíðardámi. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindini
14.15 Sum morgunstjørnan í eystri
- Um Brøðrameinigheitina, ta livandi tradisjónina í Christansfeld í Suðurjútlandi. Jørgen Bøytler, prestur, sigur frá. Janus Mohr leggur til rættis
15.00 Hornorkesturstevnan 2002
16.00 Crescendo
- Kári Olsen stílar fyri
17.00 Í víngarðinum
18.00 Tilvera - Armgarð Arge leggur til rættis
18.30 Tíðindini

## Sum morgunstjørnan í eystri




Hóast býurin Christiansfeld í Suðurjútlandi ikki er serliga gamal, er hetta tó sera áhugavert pláss, fyrst og fremst tá hugsað verður um tey kirkjuligu viðurskiftini. Herrnhutarar úr Týsklandi grundaðu býin fyri uml. 230 árum síðani, og framvegis er kirkjufólkið har, Brøðrameiningheitin, sum tey sjálvi plaga at taka til, ein livanndi tradisjón. Vit støkka inn á gólvið í kirkjuni í Christiansfeld, har Jørgen Bøytler, prestur, fer at greiða frá; fyrst um sjálvt kirkjurúmið og teir serstøku kirkjusiðirnar hjá Brøðrameiningheitini, sum kann greina sína søgu 275 ár aftur í tíðina, til 13. august 1727, men eisini roknar seg at hava søguligt samband við tað bøhmiska brøðraunitetið, sum varð stovnað í árinumum 1457 av nøkrum av fylgdarmonnum Johann Hus'. Janus Mohr leggur sendingina til rættis.

## Andre




– Familjufilmur frá 1994 um ein kóp

Whitney-húskið býr úti við sjógvin í statinum Maine, og tey eru øll góð við dýr. So fyri tey er tað onki fyri, at taka ein móðurleyan nósa í húsið. Tey rópa kópin Andre, og skjótt vendir hetta lívliga og fitta dýrið øllum upp og niður. Men alt er tíverri ikki bara stuttligt. Kóparnir hava í nógv ár darvað fiskiskapinum har um leiðir, og fiskimenninir fegnast ikki um, at fólk beinleiðis eru farin at ala kóp upp á seg. So summarið verður bæði stuttligt, men eisini ríviliga spennandi fyri øll - eisini fyri Andre.

## Trúgv: Fólkakirkjan og fundamentalistar




Bíbliunnar orð ber tað ikki til at kjakast um. Eisini í donsku fólkakirkjuni eru fólk, sum fegin vilja rópast fundamentalistar.

## Rob Roy

Kr. himmalferðardag kl. 20.05

– Søguligt drama frá 1995

Árið er 1713, og eftir ein harðan vetur noyðist Rob Roy MacGregor at læna pening frá tí ríka markgreivanum av Montrose, tí annars doyr klanurin.

Óndi hjálparmaður hansara, Archibald Cunningham, ger sínar egnu ætlanir, sum skulu geva honum allar pengarnar. Ætlanin eydnast, og Rob Roy má goyma. Frá goymistaðnum byrjar hann ein bardaga fyri at vinna heiður og æru sína aftur.

**Rás 2**

9.45 Orðið
- Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e)
- Endursending frá í gjár
- Innsløg, prát og tónleikur
- Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis.
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sent verður úr Studio7
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík
- John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR)- Evni: Jeremias profetur (4:12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e)
- Endursending frá í morgun
- Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan
- Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar
- eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar
- eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti
2:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast



# Grotto konsertir og Summartónar



**Tann 7. mai byrja vælumtóktu grotto-konsertirnar og skráin fyri Summartónar 2002 er eisini løgd**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Longu 7. mai ber aftur til at hoyra og uppliva vælumtóktu holukonsertirnar, har ein ferðast við Norðlýsinum, meðan tónleikarar skipa fyri tónleiki í onkrari holu.

Eisini er skráin fyri Summartónar 2002 løgd.

### Summartónar 2002

Fyri 10 árum síðani, í juni 1992, var fyrsta Summartónastevnan hildin.

Hugskotið áttu tey klassisku tónaskøldini innan Felagið Føroysk Tónaskøld, og Summartónar hevur síðani tá verið týdningarmiklasti føroyski pallurin hjá tónaskøldunum. Á hvørjum ári verða verk skrivað til stevnuna. Í 2002 eru hesu tónaskøldini umboðað:

Tróndur Bogason (f. 1976)
Atli K. Petersen (f. 1963)
Sunleif Rasmussen (f. 1961)
Edvard Nyholm Debess (f. 1960)
Bjarni Restorff (f. 1955)
Pauli í Sandagerði (f. 1955)
Kári Bæk (f. 1950)
Kristian Blak (f. 1947)

Til samans eiga teir 10 frumframførslur á stevnuni, og harafturat nakað tað sama av nýggjum verkum, sum hava verið framførd fyrst uttanlands, men sum nú verða at hoyra fyri fyrstu ferð á føroyskum palli.

Summartónar er altjóða festival, og hevur sum so eisini heimspremieru av útlendskum tónaverkum: 3 íslendsk, 2 úr USA og 3 donsk verk framførast fyri fyrstu ferð alment í juni í Føroyum.

Tónleikarnar framføra bæði heilt nýggjan tónleik og klassisk verk úr renissansuni til 20. øld. Prentaða skráin verður at fáa frá mai mánaði.

Luttakandi bólkarnar eru:
Les Percussions Claviers de Lyon (Frakland)
DuoDenum (Danmark)
Tórshavnar Kamarkór (Føroyar)
Albin Brass (Bretland, Føroyar, Argentina, Svøríki)
Vefsn Ensemblet (Noregi)
Aldubáran (Føroyar)
Mad Cow Sings (Danmark)
Atli Ellendersen & Sune Vejlby Brogård (Føroyar / Brasilia, Danmark)
Hlómeyki (Ísland)
Mpiri (Føroyar / Danmark)

Harafturat spæla tónleikarar úr Estlandi, Føroyum, Argentina, Eysturríki, Svøríki og Danmark í Klæmintsgjógv í samband við Concerto Grotto.

### Í bygd og bý

Konsertirnar í 2002 eru flestar um 17-24 juni. Harafturat eru konsertirnar "Sunnudagar við Gjógv" 30. juni og 14. juli. Eisini eru einstøk tiltøk í juli.

Støðini har Summartónar hava konsertir í ár eru:

Í Havn:
Meiaríið, Listaskálin, Norðurlandahúsið, Útvarpshøllin, Havnar Kirkja,

Uttanfyri Havnina eru støðini:
Vágur, Sandur, Hestur, Klæmintsgjógv, Kirkjubø, Fuglafjørður, Gøta, Gjógv, Klaksvík og Mykines - tilsamans 28 konsertir.

Harafturat koma Concerto Grotto konsertarnir, sum eisini eru fyriskipaðir av Summartónum. Tær byrja longu 7. mei og eru 21 í tali, og fara væntandi at føra útvið 1000 áhoyrarar inn í "aðra verð" undir Hestbjørgunum og undir Nólsoy.

# Teitur funnin og róstur á alnetinum



**Teitur Lassen er framvegis á ferð frameftir á leiðini móti tónatindunum úti í heimi. Nú hevur donsk tónleikaheimasíða givið honum heitið „Det færøske fund"**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Tað gongur væl hjá Teiti Lassen á leiðini mót altjóða tónatindunum.

Nú hevur ein donsk tónleikaheimasíða eina konsertupptøku við Teiti at bjóða teim vitjandi. Og síðan nevnur Teit Lassen fyri "Det færøske fund". Og við hetta verður helst sipa til, at her er nakað nýtt og øðrvísi.

Tað er síðan www.mic.dk, ið hevur rósandi orð um Teit Lassen, sum verður sagdur at hava egnan stíl og sannførandi tekstir. Síðan bjóðar eina upptøku við Teiti frá spælistaðnum Rust.

### Ikki hoyrt um tað

Teitur Lassen sigur seg ikki beinleiðis vita nakað um hesa síðuna, ella at hann er at finna har.

Teitur roknar tó við, at hetta hevur samband við, at hann einaferð varð spurdur av Konsertnet, um teir kundu taka eina konsert hjá honum upp til teirra heimasíðu, ið nevnist www.konsertnet.dk.

- Hetta hevur helst samband við tað. Helst eru konsertnet og Mic tað sama, metir Teitur Lassen í stuttari viðmerking til tíðindini um, at hann er funnin og róstur á danskari heimasíðu.